## Fimleikur fyri 59 milliónir við Tórsvøll



Tórshavnar kommuna og byggifyritøkan MT Højgaard hava í dag skrivað undir sáttmála um, at MT Højgaard skal byggja fimleikahallir og goymsluhøli við Tórsvøll. Talan er um eitt arbeiði fyri samanlagt 59 milliónir krónur. Sjálv sáttmálaupphæddin er góðar 50 milliónir krónur, men tá meirvirðisgjald, list og ókendar útreiðslur koma afturat, verður samlaða upphæddin góðar 59 milliónir krónur. Farið verður undir arbeiðið síðst í august mánaði, og tað fer væntandi at taka umleið 14 mánaðir. Tað var á býráðsfundi 19. juni, at Tórshavnar býráð samtykti at takast skuldi av tilboðnum frá MT Højgaard um bygging av fimleikahallum við norðara enda á Tórsvølli, umframt hornabygning, ið skal brúkast sum goymsluhøli av Tórsvølli. Sambært tíðindaskrivnum frá Tórshavnar býráð verður talan um eina nútímans fimleikahøll, ið stendur altjóða mát og nøktar øll krøv á økinum. Samstundis er hetta framtíðartryggjað bygging, so tað seinni ber til at byggja oman á bæði fimleikahøllina og hornabygningin.



Tormóður Stórá: - Tað er stak óheppið, at bæði viðgerðartilboðini halda summarfrí samstundis

# Rúsdrekka-misnýtarar koma á stongdar dyr

**Fólk, sum hava trupulleikar við rúsdrekka-misnýtslu, kunnu ikki koma viðgerð, tí aftur í ár hava Blákrossheimið og Heilbrigdið summarfrí samstundis**

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

- Hetta er sjálvvirkandi telefonsvvararin á Blákrossheiminum. Vit hava summarfrí og byrja aftur tann 30. juli.

Á Heilbrigdinum svarar telefonin, men boðini eru, at viðgerðarheimið er stongt vegna summarfrí til tann 18. august.

Fólk, sum hava trupulleikar við rúsdrekkamisnýtslu, kunnu sostatt ikki koma í viðgerð nú. Men tað er ikki bara í sjálvari summarfrítíðini, at viðgerðarstøðini ikki taka ímóti mis-nýtarum, tí tær seinastu vikurnar undan frítíðini verða eingir misnýtarar tiknir inn til viðgerðar. Tískil er kanska talan um meinar tveir mánaðir um summarið, at einki viðgerðartilboð er til rúsdrekkamisnýtararnar.

### Stak óheppið

Hendan trupulleikan merkja tey á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, tí tá tey bæði viðgerðarstøðini eru stongd, er psykiatriski depilin tann einasta loysnin hjá misnýtarunum og ikki minst hjá teirra avvarðandi.

-Tað er stak óheppið, at bæði viðgerðartilboðini hava summarfrí samstundis, tí vit hava einki viðgerðartilboð til rúsdrekkamisnýtarar, sigur leiðarin á psykiatriska deplinum, Tormóður Stórá.

Á deplinum kunnu tey hjálpa misnýtarum at steðga á við misnýtsluni, tey kunnu viðgera abstinensirnar, ið kunnu vera lívshættisligir hjá summum, og tey kunnu bjóða fólki antabus. Men tey hava einki viðgerðartilboð fyri rúsdrekkamisnýtslu. Á psykiatriska deplinum hava tey heldur ikki møguleikar at senda fólk í viðgerð, tí tað er tann einstaki, sum skal vera motiveraður til at fara í viðgerð.

-Tí er tað sera óheppið, at einki viðgerðarstøðini eru stongd í fleiri vikur, sigur Tormóður Stórá.

### Mugu finna loysn

Hetta er ikki fyrsta árið, at Blákrossheimið og Heilbrigdið halda summarfrí samstundis, tí soleiðis hevur tað verið tey seinnu árini.

Tormóður Stórá sigur, at tey á psykiatriska deplinum hava gjørt vart við trupulleikan fyrr, men at tíverri er einki hent. Men tey ætla sær at taka málið upp aftan á summarfrítíðina og at fáa eitt orðaskifti í lag millum partarnar, so tað slepst undan, at trupulleikin endurtekur seg næsta summar.

Hetta summarið hevur víst, at tað er neyðugt at finna eina loysn, tí sambært leiðaranum á psykiatriska deplinum hava tey ongantíð fingið so nógvar fyrispurningar frá avvarðandi hjá rúsdrekkamisnýtarum sum í summar.






Blákrossheimið: Stongt til 30. juli. Heilbrigdið: Stongt til 18. august